## Nýggj hóttan móti finskum skúla

Ein skúli í finska býnum Pyhäjärvi er afturlatin og næmingarnir sendir heim orsakað av upplýsingum um, at ein hóttan móti skúlanum er løgd út á internetið. Løgreglan sigur, at eingin orsøk er at óttast, men kannað verður, um søgurnar um hóttanir eru sannar. Samstundis kjakast myndugleikarnir í býnum um, hvussu teir skulu fyrihalda seg til hóttanirnar. Maðurin, sum stóð aftan fyri skjótaríið í Kauhajoki, kemur upprunaliga úr Pyhäjärvi, men er sambært løgregluni fluttur higaði frá í fjør. Sambært Ritzau skal finska løgreglan eisini hava ruddað ein annan skúla í býnum Jorois eystan fyri Pieksämäki eftir einari møguligari bumbuhóttan. Pyhäjärvi liggur í ein landnyrðing úr Kauhajoki.



# Gongdin móti semjuni

**Herundir stendur ein kronologisk frágreiðing frá gongdini seinasta døgnið fram móti semjuni um málsøkjabýtið millum Fólkaflokkin, Sambandsflokki og Javnaðarflokkin**

FRÁSØGN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Fundurin millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin varð ásettur at byrja klokkan 17.00, tá leiðslubólkarnir hjá flokkunum skuldu taka samráðingarnar um málsøkjabýtið uppaftur.

Tingmanningarnar hjá Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum møttu stundisliga, meðan tingmenn og landsstýrisfólk hjá Javnaðarflokkinum ikki vóru at síggja nakrastaðni.

Klokkan 17.30 frættist, at fundurin var úsettur, orsakað av at Javnaðarflokkurin hevði inannhýsis fund á Gamla Apoteki, har tey gjørdu støðuna upp. Tá klokkan gjørdist knapt 19 komu umboðini hjá Javnaðarflokkinum so niðan í Løgtingið, og samráðingarnar kundu takast upp aftur.

### Krøvini herdust

Beint áðrenn samráðingarnar vóru tiknar upp aftur, vóru Kaj Leo Johannesen og Jørgen Niclasen báðir í Degi & Viku. Tað var eyðsýnt, at hóast Sambandsflokkurin ikki setti fram nøkur »ultimativ krøv«, vóru krøvini herd yvir náttina.

Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, segði við Kringvarp Føroya, at tað var náttúrligt, at Sambandsflokkurin sum størsti flokkur fær løgmann, og um ikki, so fýra ella fimm landsstýrismenn.

Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum, segði hinvegin, at enn var einki avgjørt, og at telefonin ringdi í heilum, og at tað skarst ikki burtur, at hinir flokkarnir, sum sótu uttanfyri, lógu framvið.

Báðir flokksformennirnir kundu sostatt fara undir samráðingarnar við sera góðum kortum í hondini, ein við størsta flokkinum aftanfyri seg, og hin við hóttanini um at fara við andstøðuni.

### Løgmansmaraton

Samráðingarnar millum flokkarnar fóru soleiðs fram, at leiðslubólkarnir, sum vóru Jørgen Niclasen og Jacob Vestergaard úr Fólkaflokkinum, Kaj Leo Johannesen og Jóhan Dahl úr Sambandsflokkinum og Jóannes Eidesgaard og John Johannesen úr Javnaðarflokkinum, sótu í beinleiðis samráðingunum, meðan teir av og á fóru hvør til sítt og ráðførdu seg við baklandið, sum vóru tingmanningar og landsstýrisfólkini.

Leingi gingu samráðingarnar aftur og fram, men striltið gekst við at fáa glið á málsøkjabýtið millum flokkarnar.

Allir møguleikar vóru vendir og snaraðir fleiri ferðir, uttan at nakað sum helst tó varð flutt. Tað vísti seg skjótt, at talan varð um eitt maraton millum leiðslubólkarnar, har teir sótu og vendu og snaraðu møguleikunum, argumenteraðu fyri júst hví teir skuldu hava løgmann og tosaðu við baklandið, fyri síðan at byrja heilt av nýggjum aftur. Koyrt varð bara í ring. Eingin tóktist at vika seg somikið sum ein tumma teir fyrstu nógvu tímarnar, og allir flokkar tvíhildu um løgmanssessin. Avgerðin stóð og fall um hvør orkaði at halda á longst, og hvussu flokkarnir spældu trumfarnar hjá sær.

### Gjøgnumbrot ella jarnbrot

Tá klokkan var umleið tvey í nátt, byrjaði spakuliga glið at koma á, og ymsar ábendingar vóru um, hvør stóð sterkastur í kappingini um løgmann. Útfrá hýrinum á monnum og kvinnum sást, at ta løtuna stóð Kaj Leo Johannesen sterkastur. Men eftir øllum at døma tvíhelt Jóannes Eidesgaard enn um løgmanssessin.

At Javnaðarflokkurin stóð sera veikur í samráðingunum varð eyðsýnt, tá Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðveldi komu niðan í tingið at fregnast um gongdina. Tá vóru javnaðarumboð skjót at spyrja, hvat teir vildu har, og okkurt kundi týtt á, at nú var rætta løtan hjá Jørgen Niclasen og Fólkaflokkinum at spæla sín trumf.

Eftir hetta varð skjótt greitt, at løgmanssessurin varð komin upp á pláss, men at stríðið nú stóð seg um Uttanríkisráðið. Tískil kundi tað tykjast sum, at vitjanin frá Tjóðveldisumboðunum fingu Javnaðarflokkin at slaka nakað, og at teir tískil virkaðu sum jarnbrot til tess at fáa glið á málsøkjabýtið.

### Glið komið á

Tá klokkan var umleið fýra, frættist at Javnaðarflokkurin hevði slakað við krøvunum.

Eftir at Javnaðarflokkurin hevði slakað við krøvunum um fyrst at fáa løgmann, og um ikki, so Uttanríkisráðið, gekk tað yvirhøvir skjótt fyri seg. Leiðslubólkarnir møttust aftur stutt eftir hetta, og nú tann heilt stóri knúturin varð loystur, tóktist tað sum, at bert var eftir at býta grindina.

Í øllum førum var komið á mál stutt áðrenn klokkan hálvgum seks, og klokkan 05.30 kundi Jóannes Eidesgaard, fráfarandi løgmaður, boða frá, at samráðingarnar vóru komnar á mál og at ein semja var gjørd um málsøkjabýtið.

Niðurstøðan varð at Kaj Leo Johannesen skuldi gerast løgmaður, og at allir flokkar fingu tríggjar landsstýrissessir í part, og at nøkumlunda javnt var býtt.



*Kaj Leo Johannesen er her júst avdúkaður sum vinnarin av einum møðsamum løgmansmaraton*



*Javnaðarflokkurin var sera trekur at vika av løgmanssessinum...*



*... og Fólkaflokkurin hevði andstøðuna sum sín trumf*